## DAGSINS MEINING

# Breið samgonga við fólksins uppbakking

Nógv hevur verið sagt og skrivað um samgongusamráðingarnar. Umboð fyri andstøðuna hava víst á, at løgmaður ongantíð hevur ætlað at tikið teir við í eina breiða samgongu, ið hann annars hevur tosað so nógv um. Umboð fyri samgonguflokkarnar hava harafturímóti víst á, at andstøðuflokkarnir, serstakliga Javnaðarflokkurin hava skylduna í, at hann stendur uttanfyri. Nú restar so bert at hoyra versónina hjá sjálvum samgonguleiðaranum, Anfinni Kallsberg, løgmanni. Tað verður áhugavert at hoyra hansara útlegging um, hvør hevur útihýst hvønn, og hvør hevur telvað rætt og skeivt og ikki minst, hvør veruliga ærliga ynskisamgongan hjá løgmanni hevur verið og er.

Hann hevur fyrr úttalað, at ynskisamgongan var ADCE, ið hann jú eisini fór fyrst eftir. Men tá fekk hann trupulleikar, tí Javnaðarflokkurin vildi heldur hava løgmann at leggja kongin og geva tingformanninum initiativið. Og tá alliansa varð gjørd millum BCH var tað helst enn ein meinbogi fyri løgmann. Hon varð seinni upployst. So kom fundurin í egnum baklandi. Eftir hann segði løgmaður seg aftur vilja royna ADCE. Hann helt, at tað mundi bera til at fáa C og E at semjast. Stutt eftir tað boðaði formaðurin í Javnaðarflokkinum frá, at løgmaður heldur átti at roynt ABC. Hvussu og ikki – so tykist tað at vera hetta útspælið, sum fær løgmann at sleppa royndini við ADCE og fara beint til Jenis.

Spurningurin er bara, hví løgmaður – nú tað hevði so stóran týdning at fáa eina breiða samgongu, ið hevði fólksins uppbakking – ikki gjørdi eina ítøkiliga roynd at koma á tal við Javnaðarflokkin eftir fundin við sítt bakland! Var úttalilsið hjá javnaðarformanninum nokk til at fáa løgmann at sleppa hesi royndini, áðrenn hon varð roynd ella var tað tí, at løgmaður ongantíð hevur ætlað annað enn eina ADEH samgongu! Alt annað varð skuggaspæl?

Allan mai mánað endurtók løgmaður, at hann vildi hava eina breiða samgongu, sum hevði fólksins uppbakking. Tá avtornaði bleiv talan um alt annað – tað bleiv ein smøl samgonga, uttan fólksins uppbakking í breiðastu merking. Hvussu ber tað til, at sami løgmaður á samkomuni í Tinganesi hósdagin úttalar, at hann nú hevði fingið eina samgongu, ið hevði fólksins uppbakking? Mótsigur hann ikki sær sjálvum, tí hann hevur jú fyrr sagt, at fyri at fáa eina samgongu, sum hevur fólksins uppbakking má talan verða um eina breiða samgongu! Er niðurstøðan tí tann, at løgmaður við sínum hálvhjartaðu royndum at fáa Javnaðarflokkin við, alla tíðina hevur havt nettup ta smølu samgonguna í kvittanum? Hví hann – sum annars hevur borið orð fyri at vera bæði tignarligur og siðiligur – í hesum málinum sigur eitt men ger eitt annað – má løgmaður svara fyri. Ella var Jenis svarið, tá E setti løgmanni kvívin á barkan og segði: antin vrakar tú C ella vraka vit teg!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein stutt viðmerking til Jákup Sólstein

**Jóannes Eidesgaard**



**Eg las áhugaverdu samrøðuna við formannin í Føroya Reiðarafelag, sum stóð í blaðnum í vikuni í samband við formansfrágreiðingini til aðalfundin. Yvirskriftin var so sigandi sum: "Gongur væl hjá høvuðsvinnuni, gongur eisini væl hjá landinum". Og hetta er so rætt, sum tað er sagt.**

Síðani varð m.a. sagt, at avreiðingarvirðið var oman fyri 2 milliardir, og at bara hjá limunum í Reiðarafelagnum vóru hýrurnar upp á 740 mió. kr. Út frá hesum hýrum og umsitingarlønini og avlopi metti Jákup Sólstein, at skatturin lá væl oman fyri 300 mió. kr.. V.ø.o. at fiskimenn og reiðarar lata almennu kassunum 66 oyru fyri hvørt kilo.

Og alt í alt er hetta gleðilig tøl og ein gleðiligur boðskapur, sum borin var fram, tí seinastu árini hava jú skarað framúr, bæði hvat veiðinøgd og hvat fiskaprísi viðvíkur. Og hetta frøast vit øll um saman við Jákupi Sólstein og øðrum góðum fólkum.

Men endin av samrøðuni ber brá av, at formaðurin skal rættvísgera okkurt. Tað er eins og hann skal rættvísgera tilveruna hjá hesum parti av okkara samfelag, hóast neyvan nakar í hesum landi ikki kennir týdningin av okkara høvuðsvinnu og týdningin av, at henda vinna er mannað við dugnaligum fólki bæði á sjógvi og landi.

Men samfelagið er jú soleiðis lagað, at vit eru øll hvør í sínum lagi farin til ymiskar arbeiðsuppgávur, og samfelagið hevur brúk fyri okkum øllum. Fiskimaðurin, reiðarin, læknin, lærararin, arbeiðsmaðurin, presturin, pedagogurin og øll hini. Øll eiga sín týðandi leiklut. Og vit hava brúk fyri øllum.

Í endanum av greinini sigur Jákup Sólstein, "at tað eru tey, sum halda, at fiskivinnan einans er eitt fyribrigdi, sum á meira ella minni ólógligan hátt hevur tiltuskað sær rættin til "ogn Føroya fólks" uttan at gjalda nakað fyri tað".

Nú veit eg ikki hvørji hesi "tey" eru, sum Jákup Sólstein hugsar um, men neyvan eru tað nøkur okkara, sum ikki fult og heilt skilja, at sjálvandi skulu okkara fiskimenn og okkara reiðarar nýta rættin at veiða okkara grunnar. Her er einki tiltuskað, tí soleiðis skal tað vera, og soleiðis fer tað eisini at verða í framtíðini.

Men kanska hevur Jákup Sólstein hoyrt onkran m.a. undiritaða tosa um, at tað ikki ber til, at veiðirættindi, sum eru tillutaði ókeypis, knappliga gerast handilsvøra, har vinningurin fer í lumman á tí, sum einaferð fekk hetta loyvið. Og tað er hvør sítt mál. Tað er hesa spekulasjón, sum m.a. Javnaðarflokkurin við steðga.

Hví skulu menn, sum hava selt bátin, og sum ikki ætla sær nýggjan bát, eftirfylgjandi selja rættindini fyri fleiri milliónir? Hví skulu menn sita við rættindum uttan veiðitól, soleiðis at aðrir mugu keypa hesa rættindi fyri dýra pengar? Hví skal tað vera so trupult fyri ungar menn at koma inn í fiskivinnuna, tí teir skulu gjalda ein yvirprís fyri rættindini? Hví skal ein bátur, sum ongan húk hevur umborð, og sum bert trolar, fáa tillutað eitt íslandsloyvi? Og hví skulu gomul skip og gamlir bátar gerast dupult so dýr, tí eitt fiskilyvi hongur uppií?

Tað eru hesar spurningar, sum m.a. eg havi nevnt, og sum eg haldi átti at verðið loystir ongantíð ov skjótt. Hetta er ikki eitt álop á einstaklingar hvørki reiðarar ella aðrar, men hetta eru dømi um eina skipan, sum er farin av kós, og sum má rættast uppaftur.

# Hevur tjóðveldisflokkurin nakað stev?

**Páll Poulsen**
*Tórshavn*

Samgongusamráðingarnar vístu loksins at leiðsla Tjóðveldisflokksins ikki hirðir Suðurstreymi umboðan í Føroya Landsstýri. Annað enn hvat órytmiski stevloysingurin og tónadeyvi "hvørt av sínum" og "ræðumyndin" Høgni Hoydal heldur seg sleppa snikkaleysan undan.

Tað er láturligt at hendan "fullveldistilgongdin" eisini umfatar rættarmál, tá ið Havnin ikki er betri umboðað. Her er flokkurin aftur á einum lokalpatriotiskum heimastýrisstøði, sum hann einaferð skuldi eitast at hóra undan.

Vit vita eisini hvussu trekir teir vóru við lønunum á Strandferðslu og Brimli, men at seta ein landsstýrismann afturat, tað var eingin trupulleiki.

Høvuðsorsøkin til at landsfyrisitingin er so dýr, kemst av at løgfrøðilig arbeiði ikki eru gjørd í Landssstýrinum, men uttanfyri. Hetta kostar hópin av peningi og her vassar Hoydal ov langt út.

Skúlin á Trøllanesi er eitt námsfrøðiligt eksperiment, ið vísir at ein høvuðsstaðar Havnaleið er nógv búnari enn nøkur bygdaloysn. Hetta er ein leivd frá mentunnarsjórænaranum Torbirni Jacobsen. (Sjálvuppgjørdur Guevara við yvirgervaðum blóðtrýsti).

Tjóðveldisflokkinum tørvar politiskt "consensus" so flokkurin kemur uppaftur í andahædd høvuðsstaðar, har endamálið, ikki persónligt agg er berandi styrkin. Hetta kemur kanska at kosta Høgna kotið?

Tað ber heldur ikki til at tjóðveldisflokkurin hevur landstýrismann í ringari luft og ongum innihaldi. Einki kemur burturúr.

Er fullveldið annað enn ull á Sandi? Kotið úr plastikki, og hvørt av sínum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Valið 2002 - Landsstýrið heldur fram

**Jógvan Sundstein**



Løgtingsvalið var 30. apríl 2002, og úrslitið kenna øll. Valið varð útskrivað, tí 4 ára valskeiðið var runnið. Hetta skuldi sostatt gerast eftir stýrisskipanarlógini. Løgmaður og landsstýrið hansara var ikki fráfarið áðrenn valið og hevði heldur ikki fingið nakra misálitisváttan. Valið gav heldur ikki løgmanni og landsstýrinum misálit, tí varð stýrið sitandi.

Ein stór misfatan sýnist at vera millum politikarar, tíðindafólk og fólk yvirhøvur um, at nýtt landsstýri skal skipast eftir eitt val, og at løgmaður skal veljast av nýggjum. Hetta er bara ikki so. Løgmaður, sum ikki antin sjálvur hevur sagt seg frá ella er frákoyrdur við misálitisváttan, avgerð sjálvur út fra síni egnu meting av politisku støðuni, um hann heldur fram ella ikki. Eftir nýggju stýrisskipanarlógini er tað ikki nøkur sjálvfylgja, at landsstýrið skal endurskipast aftaná eitt løgtingsval. Eftir gomlu lógini skuldi bæði løgmaður og landsstýri veljast av løgtinginum aftaná hvørt løgtingsval. Tá var landsstýrisskeiðið tað sama sum løgtingsskeiðið.

Ein onnur stór misfatan er, at eitt landsstýri skal byggja á ein avgjørdan meiriluta á løgtingi, tað vil siga í minsta lagi 17 av 32 tingmonnum. Kravið er, at løgmaður ikki má hava avgjørdan meiriluta, tað vil siga minst 17 tingmenn, ímóti sær. Og hesin avgjørdi meiriluti má staðfestast við eini misálitisatkvøðugreiðslu.

Parlamentariska grundarlagið hjá einum løgmanni og hansara landsstýri kann tí vera skiftandi. Tað er bert burtur um meiri enn 17 staðfesta at vera ímóti. Tann ella teir flokkar, ið mynda eitt landsstýri hava tí ikki fyri neyðini at hava nakran avgjørdan meiriluta í løgtinginum. Vit síggja i hinum Norðanlondum, at stjórnir sita, har stjórnarflokkarnir bert hava lítlan part av tingmonnum beinleiðis aftanfyri seg. Til dømis hava stjórnarflokkarnir í Danmark bert um leið 70 tingmenn av 179 aftanfyri seg og í Noreg bert um leið 45 av 155 tingmonnum. Í Svøríki hevur sosialdemokratiski stjórnarflokkurin eisini væl minni enn helmingin av tingmannatalinum. Tað ræður bert um ikki at hava fleiri ímóti sær, sum vilja skipa eina alternativa stjórn.

Valkvøldið varð staðfest, at løgmaður ikki hevði avgjørdan meiriluta ímóti sær. Hann og landsstýrið var tí sitandi við fullum heimildum. Tað var tí heldur ikki neyðugt hjá løgmanni at gera nakað annað enn at staðfesta hendan veruleika, og so annars halda fram við landsstýrisarbeiðinum. Løgmaður gjørdi fyri so vítt eisini hetta, men samstundis fór hann undir samráðingar um at umskipa landsstýrið, soleiðis at hetta kundi hava beinleiðis avgjørdan meiriluta í tinginum. Hann fór sostatt undir at fáa í lag eina meirilutasamgongu.

**Hugtakið samgonga**
Í føroyskum politikki er orðið samgonga vorðið eitt slíkt hugtak, at fólk halda, at landið kann ikki stýrast uttan at vit hava eina slíka. Og fyribrigdið samgonguskjal er í vitskuni hjá fólki og hjá politikarum blivið til eitt so heilagt skjal, at tað gongur fram um lógarkrøv og stýrisskipan. Veruleikin er tann, at hugtakið samgonga ikki finst í føroysku stjórnarskipanini. Hugtakið er komið av, at í stýrisskipanini frá 1948 kravdist avgjørdur meiriluti á tingi fyri at velja landsstýrismenn (ikki løgmann), og fyri at fáa lógaruppskot samtykt.

Av hesi orsøk hava vit politiskt livað við eini skipan, sum í veruleikanum bygdi á meirilutadiktatur heldur enn vanligt parlamentariskt demokrati. Roynt hevur verið aftaná hvørt val at skipa eina meirilutasamgongu, sum valdi løgmann og landsstýrismenn. Hesin meiriluti, sum altíð hevur umfatað fleiri flokkar, hevur so stýrt landinum í viðkomandi valskeiði. Allar ósemjur, og tær hava mangan verið stórar, skuldu ruddast av vegnum innanfyri samgonguna, og síðani varð farið í tingið við málinum. Úrslitið varð, at andstøðan, tað vil siga flokkarnir uttanfyri landsstýrissamgonguna, fingu so gott sum onga ávirkan á loysnir av málum. Tað hevur tí eisini verið sjáldsamt við breiðum semjum um stórmál á tingi seinastu hálvu øldina. Alt tíðarskeiðið hevur eisini verið sermerkt av, at samgongur altíð hava havt "skuldina", meðan andstøður ongatíð hava havt nakra "skuld", tíansheldur ábyrgd.

**Nýggj stýrisskipan í 1994**
Í 1994 fingu vit nýggja stýrisskipan. Eftir hesi er sjálvandi møguleiki fyri meirlutalandsstýri, men nýggju reglurnar geva eisini møguleika fyri minnilutalandsstýrum, sum kunnu arbeiða á nógv breiðari politiskum grundarlagi við øllum flokkum í tinginum, sjálvt um hesir ikki eru umboðaðir í sjálvum landsstýrinum. Á hendan hátt verður minni innanhýsis stríð í landsstýrinum, málini kunnu sakligа viðgerast betur í teim ymsu stýrunum og semjurnar, sum ofta vilja hava breiðari undirtøku, kunnu gerast í sjálvum tinginum. Ábyrgdin liggur á einstaka landsstýrismanninum at gera eitt dygdargott arbeiði, men hon liggur eisini á teim ymisku flokkunum í tinginum, sum við at gera semjur kunnu fáa størri ávirkan á politisku gongdina.

Vit hava nú fingið eitt meirilutalandsstýri aftur. Tað hevur kunngjørt eitt samgonguskjal, sum vónandi ikki er annað enn ein vanligur arbeiðssetningur, og ikki nakrar ásetingar, sum komandi fýra árini skulu brúkast til at sláa hvønn annan í høvdi við. Hesin setningur er skilagóður og kann vónandi nýtast sum grundarlag fyri einum dygdargóðum arbeiði. Andstøðuflokkarnir báðir hava eisini boðað frá, at teir stórt sæð taka undir við arbeiðsætlanunum. Hesir báðir flokkar hava tí nú bundið seg til og hava allar møguleikar til at gera eitt gott arbeiði á Løgtingi, tá málini koma fyri. Hetta gerst við at taka undir við teimum og snáka tey til, har hetta er neyðugt. Um hesir flokkar, aftaná tær útsagnir teir eru komnir við, ikki vísa viljan til slíkt samarbeiði verður leingi, áðrenn teir kunnu vænta sær veruliga politiska ávirkan.

**Hví hava vit núverandi politiska uppbýti?**
Hóast flokkarnir í núverandi landsstýri eru ymiskir og ikki serliga homogenir, er orsøkin til hesa landsstýrisskipan tann, at teir báðir stóru andstøðuflokkarnir vilja ov lítið fyri at gera Føroyar meiri sjálvstøðugar. Hesir flokkar mugu gera sær greitt, at so leingi teir hava sum beinleiðis endamál at Føroya skulu vera partur av øðrum landi, tæna teir ikki landsins gagni. Sjálvt um tað eydnast teimum í eina tíð enn, at tarna frígeringini av landinum, so koma teir fyrr ella seinri at ásanna, at politikkur teirra á hesum øki var skeivur. Teir koma eisini at ásanna, at atkvøðuframgongd bygd á følsk lyfti um, at trygdin hjá eini tjóð liggur í at geva seg undir aðra tjóð, bert er løtuvinningur, og ikki kemur at halda tá ástendur. Hesir flokkar, um teir veruliga skulu fáa politiskan týdning, mugu tí broyta kósini til eina sjálvstýriskós, har suvereniteturin má útvegast, áðrenn verulig menning av tjóðini kann fara fram.. Hvussu skjótt tað skal ganga kann so altíð skiftast orð um. Serligan týdning hevur hetta fyri Javnaðarflokkin, sum á heilt ónátúrligan hátt hevur gjørt seg meiri sambandskan enn Sambandsflokkurin og í valstríðnum klistra seg afturat hesum flokki.

Um javnaðarflokkurin hevði meldað klárt út við eini sjálvstýrisgongd - skjótt ella spakuliga - hevði eg persónliga hildið, at eitt landsstýrið - eisini hesu ferð - skipað av Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum, møguliga við teim báðu smáu flokkunum, hevði verið nógv tann besta loysnin. Eitt slíkt landsstýri hevði innanhýsis arbeitt friðaligt, og hevði havt stórar møguleikar at fingi stórmál ígjøgnum í tinginum saman við antin Sambandsflokkinum ella Tjóðveldisflokkinum og við hvørt saman við báðum.

# Kirsten Brix skal verja Bábelstornið



**PH.D RITGERÐ**
*Tíðindaskriv*

Fríggjadagin 14. juni 2002 kl. 13.00 fer Kirsten Brix, cand.mag. at verja ph.d.ritgerðina Dialog i Babelstårnet. Analyse af Regin í Líðs fiktive prosaforfatterskab.

Verjan, sum er almenn, verður í samkomuhøllini á Føroya Studentaskúla.

Í dómsnevndini hava sitið Turið Sigurðardóttir, lektari, cand.mag. á Fróðskaparsetrinum, Anne Kari Skarðhamar, fyristiamanuensis, dr.art. við Høgskolen í Oslo og Martin Zerlang, lektari, mag.art. við Universitetið í Keypmannahavn.

Ph.d.ritgerðin er eisini komin út í bók og fæst til keyps í bókabúðunum. Hon kostar 220 kr, sigur Fróðskaparsetur Føroya í tíðindaskrivi.

# Tá ið veruleikin fer um mark…

**FYRILESTUR**
*Tíðindaskriv*

Fróðskaparsetur Føroya skipar fyri almennum fyrilestri í Ovastovu í Nóatúni mikukvøldið 12. juni 2002 kl. 20.00. Martin Zerlang, lektari í bókmentafrøði, mag.art., heldur fyrilestur, ið hann kallar: Tá ið veruleikin fer um mark - um gandarealismu.

Martin Zerlang er lektari í bókmentafrøði við Institut for Litteraturvidenskab á Keypmannahavnar Universiteti. Hann vitjar Fróðskaparsetrið í sambandi við, at hann er í dóms nevndini, sum skal døma ph.d. ritgerð á Fróðskaparsetrinum.

Tað var bókmentasøguliga ein av stórhendingunum í 20. øld, tá eitt lið av latínamerikonskum rithøvundum fór at blanda saman frumsagnir og veruleika í hini sonevndu magisku realismuni. Takkað veri høvundum sum Miguel Angel Asturias, Juan Rulfo, Alejo Carpentier, Gabriel García Márques og Isabel Allende umskapaðist ein mentanarligur útjaðari til mentanarligan miðdepil.

Og í teimum gomlu mentanarmiðdeplunum gav hesin teymaleysi veruleikin íblástur til at kanna sínar egnu frumsagnir og skrøggsøgur. Evnið í fyrilestrinum er hesar umskaringarnar í bókmentaligu veruleikamyndini.